Búskapur og vinna:

13 søktu

Trettan feløg søktu um loyvi at útvinna olju, tá norsku oljumyndugleikarnir herfyri høvdu sítt 17. útbjóðingarumfar. Øll loyvini eru í Norskahavinum.

Tey trettan feløgini, sum søktu, eru Agip, BP, ChevronTexaco, Conoco, DONG, Enterprise, Fortum, Gaz de France, Norsk Hydro, Philips, RWE-DEA, Shell og Statoil.

Norsku myndugleikarnir ætla, at feløgini skulu fáa svar einaferð í vár ella tíðliga í summar.

Ov høg løn

Í Danmark ávarar Tjóðbankin um, at lønirnar í Danmark veksa skjótari enn í øðrum londum. Tað ger, at kappingarevnini hjá danska ídnaðinum versna, og at inflasjónin verður togað uppeftir.

Tjóðbankin sigur, at tað er umráðandi at halda aftur í lønarhækkingum. Bankin sigur, at lønarvøksturin í Danmark hevur verið á leið tann sami sum í hinum ES-londunum, men at í 2001 var vøksturin størri í Danmark enn aðrastaðni.

Tjóðbankin sigur eins og undanfarin ár, at danski búskapurin er væl fyri, men at stjórnin eigur at varðveita verandi avlop á fíggjarlógini og at rinda ta almennu skuldina niður.

Vandi í vælferð

Tað fer at koma keypiorkuni hjá tí einstaka norðmanninum væl við, at stjórnin hevur gjørt av at nýta meiri oljupengar, samstundis sum prísvøksturin er lítil. Harafturat kemur, at flestu norðmenn fáa fimm prosent meiri í løn í ár enn í fjør.

Men felagið hjá norsku fíggjarstovnunum ávarar um, at gleðin kann gerast stokkut. Sagt verður, at ein stórur partur av landsins ídnaði hevur veksandi trupulleikar á marknaðinum orsakað av vantandi kappingarevni, og at hetta sum frá líður kann hava við sær, at fyritøkur lata aftur, og at arbeiðsloysið fer at veksa.

UTTAN ÚR HEIMI

Cheney heimaftur sum av torvheiðum

Hevði vitjanin hjá amerikanska varaforsetanum í níggju arabiskum londum til endamáls at savna stuðul til álop á Irak, var ferðin bummtúrur

YVIRGANGUR
Árni Joensen

Ariel Sharon og Dick Cheney

Mynd: Reuters

Áðrenn Dick Cheney fór á sína fyrstu uttanmlandsferð sum varaforseti, var øllum greitt, hvat endamálið við ferðini til MiðeystURS var: At útvega USA arabiskan stuðul til eina hernaðarliga uppgerð við irakska forsetan Saddam Hussein og fullan stuðul til framhaldandi bardagan ímóti yvirgangi.

Engin er í iva um, hvussu stóran týdning amerikanska stjórnin hevur lagt í ferðina hjá Cheney, og tí man tað vera ein vónsvikin varaforseti, sum skjótt vendir heimaftur. Eingin av teimum arabisku leiðarunum, sum Cheney hevur hitt á ferðini, hevur játtað at taka undir við amerikansku ætlanini at søkja at Irak. Einasta úrslitið var, tá saudiarabiski krúnprinsurin, Abdullah, tók av einari innbjóðing um at koma til Washington at hitta George W. Bush, forseta einaferð í vár.

Hinvegin fekk Cheney at vita frá øllum teimum arabisku leiðarunum, at USA eigur at leggja størri trýst á Ísrael og Ariel Sharon, forsætisráðharra fyri at hann at ganga við til at gera ein friðarsáttmála við palestinar. allir kravdu teir eisini, at Ísrael skal lata Yasser Arafat fara til Beirut, tá arabisku londini fara at halda toppfund har um eina viku.

Heldur ikki Kuwait

Dick Cheney hevði ivaleyst væntað, at leiðararnir í Kuwait mundu fara at taka undir við amerikanska uppskotinum um at gera av við Saddam Hussein, tá hugsað verður um, at amerikanskt herurin rak irakar úr Kuwait í 1991.

Men heldur ikki her var nakar stuðul at fáa. Varaforsætisráðharrin í Kuwait, Sheikh Sabah Al-Ahmed Al-Sabah, gjørdi greitt, at Kuwait tekur ikki undir við amerikanska ætlanini at leypa á Irak. Hann vísti á, at eitt álop fer at raka irakska fólkið meint, og hann helt heldur ikki, at USA hevur nakra beinleiðis orsøk til at søkja at Irak.

Harafturímóti mælti ráðharrin USA til at leggja størri trýst á Saddam Hussein fyri at fáa hann at loyva vápnaeftirlitsmonnunum hjá ST at halda fram við arbeiðinum í Irak.

Saudiarabia, Egyptaland og Jordan, sum vanliga verða roknað sum sameind hjá USA, hava eisini gjørt Dick Cheney greitt, at USA fær ikki teirra stuðul til eitt álop á Irak. Jordanski kongurin, Abdullah, ávaraði tvørturímóti USA ímóti at fara undir eitt hernaðarligt ævintýr í Irak, siga eygleiðarar í Amman.

Ovurstórt ísfjall loysnað við Antarktis

Eitt ovurstórt ísfjall er loysnað og flýtur nú í Amundsen Havinum sunnan fyri Kyrrahavið

ANTARKTIS
Árni Joensen

Tey flestu hava sæð myndir av ísfjøllum í Grønlandi og aðrastaðni, men tað ísfjallið, sum nú flýtur í Amundsen Havinum, kann valla kalla eitt ísfjall, so stórt er tað.

Vísindamenn siga, at ísfjallið er 3.250 ferkilometrar til støddar ella meiri enn tvær ferðir so stórt sum Føroyar, og teir halda, at tað vigar umleið 720 milliardir tons.

Ísfjallið, sum hevur fingið navnið Larsen B, byrjaði at loysna í januar, og nú hevur ein amerikanskur fylgisveinur staðfest, at tað er leyst. Vísindamenn halda, at tað er tann veksandi hitin á Jørðini, sum er orsøkin til, at tað ovurstóra ísfjallið er loysnað.

Larsen B er tað størsta ísfjallið, sum er loysnað seinastu 30 árini.

Úr Norðurlondum:

Skatt fyri gjald

Norski flokkurin Vinstri mælir til at taka av regluna um, at fólk skulu rinda sjónvarpsgjald. Flokkurin heldur, at fólk heldur skulu rinda sjónvarpsgjaldið ígjøgnum skattin.

Norski Vinstri heldur, at verður sjónvarpsgjaldið lagt inn í skattin, kundi gjaldið verið lægri enn nú, tí við at lagt tað inn í skattaskipanina hevði borið til at fingið fatur á teimum, sum í dag skáka sær undan at rinda sjónvarpsjaldið.

Fleiri lærarar

Eftir at leiðslan í danska skúlaverkinum í fleiri ár hevur kært seg um, at trot er á lærarum, og at alt ov fá velja læraraútbúgvingina, tykist broyting vera komin í nú. Eftir einari uppgerð hjá læraraskúlunum hava skúlarnir fingið sjey prosent fleiri umsøkjarar í ár enn í fjør. Freistin at søkja var úti tann 15. mars.

Samstundis vísir uppteljingin, at áhugin at læra til lærara er størstur júst í teimum økjunum, har læraratrotið er serliga stórt. Tað er serliga á bygd, at trot er á lærarum.

Læraraskúlin í Hadersleev hevur síðani september í fjør roynt eina skipan við fjarlestri, sum ber í sær, at næmingunum nýtist ikki at vera í skúlanum meiri enn 25 prosent av skúlatíðini. Hetta hevur eftir øllum at døma stóran áhuga, tí í ár hevur skúlin fingið 203 umsóknir, og tað er næstan tvær ferðir so nógv sum seinast.

VG vinnur

Ein kanning hjá Gallup vísir, at alt fleiri norðmenn lesa blaðið VG, meðan hini bæði stóru bløðini, Aftenposten og Dagbladet, missa lesarar. Sambært kanningini lesa 1.345.000 norðmenn VG hvønn dag, og tað er 36.000 fleiri enn fyri einum ári síðani.

Kanningin sigur eisini, at 91 prosent av øllum norðmonnum oman fyri 13 ár lesa minst eitt blað um dagin.

Helmingurin umhugsað at søkja annað starv

Trivnaðarkanningin hjá Føroya Lærarafelag vísir, at stór semja er um, at ónøgdin millum lærarar er vorðin størri. Arbeiðstíðin røkkur ikki til, broytingar henda alla tíðina og virðingin frá almenninginum er minkandi, halda lærarar

FÓLKASKÚLIN
Turið Kjølbro

- Nógv teir flestu lærararnir siga seg hava tað gott saman við næmingunum, foreldrunum og hava eisini góð viðurskifti við leiðsluna á skúlanum, sigur Bjarni Mortensen, samskipari av trivnaðarkanningini

Mynd: Dagfinn Olsen

Slakur helmingur av fólkaskúlalærarunum kring landið hevur talað. Og talan er greið. Nøgdsemi innan skúlagátt er dalandi, og týðilig tekin eru um, at eitthvørt má gerast, soleiðis at lærarar aftur støðast betur í sínum starvi. Hetta kemur fram í stórari trivnaðarkanning, teirri fyrstu av sínum slag í Føroyum. Bjarni Mortensen hevur samskipað kanningina fyri Føroya Lærarafelag. Spurnarbløð vórðu send út til virknu limirnar hjá Føroya Lærarafelag. Tá ið avtornaði svaraðu 309 lærarar ella 42 prosent. Kanningin er ikki endaliga avgreidd. Tá ið hon verður liðugt, helst áðrenn páskir, verður hon latin nevnd Føroya Lærarafelags til viðgerðar.

Endamálið við kanningini er at fáa greiði á, hvørjir trupulleikar eru í fólkaskúlanum og hvussu útbreiddir teir eru. Høvuðsspurningurin í kanningini er ti, hvussu tað er at vera lærari í Føroyum í dag. Umfram viðger kanningin nógv viðurskifti, sum hava ávirkan á trivnaðin í skúlaverkinum.

Í viðgerðini av spurnarbløðunum eru evnini býtt upp í tveir høvuðsbólkar, sum eru innanhýsisviðurskifti og uttanhýsisviðurskifti. Innanhýsisviðurskifti eru viðurskifti, so sum viðurskifti millum lærarar og næmingar, starvsfelagar og leiðslu, og uttanhýsisviðurskifti eru viðurskifti, so sum møguleikar fyri fakligari menning, viðurskifti við foreldur, og nøgdin við almennu skipanina.

Fyri at fáa eina heildarkenda mynd av nøgdseminum millum lærarar, eru nógvir almennir spurningar í kanningini.

- Allir spurningarnir hava týdning fyri heildina og geva eina ábending um, hvussu tað er at vera lærari í Føroyum. Styrkin í eini slíkari kanning er, at hon vísir, hvussu útbreidd ymisk viðurskifti eru. Veikleikin er, at hon ikki vísir eina so fjølbroytta mynd, sigur Bjarni Mortensen.

Stór semja

Kanningin vísir, at nógv viðurskifti tala fyri, at tað er gott at vera lærari. Nógv teir flestu lærararnir siga seg hava tað gott saman við næmingunum, foreldrunum og hava eisini góð viðurskifti við leiðsluna á skúlanum. Halda vit fast við, at júst hesi viðurskifti eru kjarnan í lærarastarvinum, merkir tað harvið, at flestu lærarar eru nøgdir við sítt starv. Flestu lærarar hava eisini svarað, at teir í ein ávísan mun ella í stóran mun eru nøgdir í sínum starvi. Harumframt svaraðu umleið 70 prosent eisini, at teirra starv í ein ávísan mun livir upp til tað, sum teir fata er gott arbeiði.

Tá tað er sagt vísir kanningin samstundis greitt, at stórir trupulleikar eru. Stór semja er um, at ónøgdin millum lærarar er vorðin størri. Nógvir lærarar siga seg eisini vera minni nøgdir við arbeiðið enn teir hava verið, og helvtin av teimum, sum hava svarað, siga seg av álvara hava umhugsað at søkja annað starv. Somuleiðis eru nógv ónøgd við, at nógvar broytingar henda alla tíðina, at arbeiðstíðin ikki røkkur til, at tann uppalandi uppgávan fyllir meir, at virðingin frá almenninginum er minkandi, og at skúlaverkið ikki megnar at taka sær av næmingum við serligum tørvi. Eisini eru lærarar ónøgdir við, at møguleikarnir fyri eftirútbúgving eru ónøktandi.

- Vandin er tann, at 25 prosent siga seg ikki vera nøgd við teirra arbeiði og at ein lítil helvt sigur, at nøgdsemi er broytt til tað verra seinnu árini. Umframt halda eini 80 prosent, at ónøgdin millum lærarar er vaksin, og umleið helmingurin hevur av álvara umhugsað at søkt annað arbeiði. Nógvir lærarar lýsa kjarnuna í lærarastarvinum positivt, men vandin er, at sleppur negativa gongdin at halda fram, so ónøgdin og frustrasjónirnar vaksa, fara lærarar at støðast enn verri og nógv fara at søkja onnur størv, sigur Bjarni Mortensen.

Nógv tíð til annað

Í spurnarbløðunum hava lærarar havt møguleikan at gera skrivligar viðmerkingar til ymisk evni. Helmingurin av teimum, sum hava svarað, hava brúkt hendan møguleikan og øll vísa á trupulleikar. Nógvir lærarar greina nærri, at uppalingarliga uppgávan tekur ov nógva orku og tíð í skúlanum, og ov lítil tíð sostatt verður til undirvísing.

- Tá ið tað er sagt siga flestu lærarar, at teir hava góð viðurskifti við næmingarnar og at hesi viðurskiftini eru vorðin betri seinnu árini. Tað er ein nýggj frustrerandi støða, at tað uppalingarliga fyllir meir, men tað sýnist ikki, at tað oyðileggur viðurskiftini, sigur Bjarni Mortensen, sum leggur afturat, at nógvir lærarar meta tað sum positivt, at viðurskiftini ímillum lærarar og næmingar í dag eru meiri javnsett enn fyrr.

Frágreiðing um kanningina verður almannakunngjørd í hesum mánaðinum. Hon verður løgd á heimasíðuna hjá Føroya Lærarafelag.

Hanni í Smiðjuni

Í gjár lat framsýning upp í Smiðjuni í Lítluvík við verkum eftir Hanna Bjartalíð og Annu Säppala

LISTAFRAMSÝNING
Turið Kjølbro

Hesa vikuna verður høvi at síggja oljumálningar og grafikk eftir Hanna Bjartalíð, ættaður úr Klaksvík og búsitandi í Finnlandi, og Anna Säppala, úr Finnlandi, í Smiðjuni í Lítluvík.

Framsýningin er sera forkunnug, ikki minst tí, at upprunatekningarnar til tær nýggju bókurnar eftir Dánial Hoydal, Siggu Vang og Sólrún Michelsen, sum Bókadeild Føroya Lærarafelags júst hevur givið, eisini verða sýndar fram. Hesar myndirnar hava Hanni sjálvur, Bárður Oskarsson og Edward Fuglø teknað.

Hanni Bjartalíð er útbúgvin á Nordiska Kostskolan í Kokkola í Finnlandi, har hann starvast sum listamaður. Hann hevur sýnt nógv fram í Føroyum, á ólavsøku, várframsýningum, norðoyastevnu, og í Smiðjuni í Lítluvík. Eisini sýnir hann javnan fram uttanlands, serliga í Danmark og Finnlandi.

Framsýningin lat upp í gjár, og er opin hvønn dag frá 14.00 - 18.00 til og við pálmasunnudag 24. mars.



Myndir til bókina, Í Geyma